Norðurlendska Ráðharraráðið

NORÐURLOND 2026

# Sameind í skiftandi tíðum

Formansskapurin hjá Danmark og Føroyum í Norðurlendska Ráðharraráðnum 2026



INNIHALD

Fororð hjá stjórnarleiðarum 3

Fororð hjá samstarvsráðharrunum 5

Norðurlond: Heimsins mest burðardygga og integreraða landaøki í 2030 7

Tvørgangandi fokusøkir í formansskapinum 10

Grøn Norðurlond 15

Kappingarfør Norðurlond 22

Sosialt burðardygg Norðurlond 27

Vit arbeiða fyri at tryggja, at Norðurlond eru sameind í skiftandi tíðum 35

Um hesa útgávu 36

Nettøk útgáva á: https://pub.norden.org/politiknord2025-724

# Fororð hjá stjórnarleiðarum




Mette Frederiksen, forsætisráðfrúgv (Danmark) og Aksel V. Johannesen, løgmaður (Føroyar)

**Myndir:** Statsministeriet & Erla Rajani Ziskasen

Norðurlond standa í eini nýggjari tíð.

Við álopinum hjá Russlandi á Ukraina stendur eitt kríggj á okkara egnu gátt. Ranglætissøgur hótta okkara fólkaræði, og fíggindalig hybridálop seta samhaldsfestið undir trýst.

Í slíkari óvissutíð er avgerandi, at Norðurlond halda saman. Vit eru sterk lond, sameind av eini frálíkari samfelagsskipan, sum er eyðkend av stórum áliti, langari felagssøgu og djúpum samstarvi. Henda felagsskapin tørvar okkum nú. Tí er yvirskriftin fyri formansskapin í Norðurlendska ráðharraráðnum í 2026: *Norðurlond – sameind í skiftandi tíðum*.

Tá heimurin broytist, mugu vit eisini flyta okkum. Við limaskapinum hjá Svøríki og Finnlandi í NATO er norðurlendska familjan vorðin enn tættari knýtt – og um øll átta londini hava vit eina felags uppgávu: at verja okkara virðir og vælferðarsamfeløg.

Tað krevur enn tættari samstarv. Um samfelags- og veitingartrygd, tilbúgving, grøna umlegging, styrkt norðurlendskt kappingarføri, niðurberjing av fleirlandakriminaliteti og vernd av børnum og ungum í talgildu øldini – fyri at nevna nøkur dømi.

Til at tryggja, at Føroyar, Grønland og Áland fáa møguleikan at gerast fullir limir í norðurlendska samstarvinum, fara vit at arbeiða fyri at dagføra norðurlendsku grundlógina, Helsingforssáttmálan.

Grønland luttekur í útvaldum virksemi undir Norðurlendska ráðharraráðnum, men verður ikki partur av formansskapinum hjá Danmark og Føroyum í 2026.

Grønland fer tó virkið at luttaka í arbeiðinum at seta eina nevnd til at dagføra Helsingforssáttmálan – eitt avgerandi stig, um Grønland skal verða viðurkent sum javnbjóðis samstarvspartur í norðurlendska samstarvinum.

Norðurlond skulu hava gott tilknýti til allan heim. Í nýggja geopolitiska veruleikanum kunnu vit ikki rokna við status quo. Tí fara vit at arbeiða fyri at styrkja samstarvið við lond, ið hava somu virðir sum vit.

Gjøgnum skiftandi tíðir skulu Norðurlond vera heimsins mest integreraða og burðardygga landaøki – til gagns fyri Norðurlond, til kveikingar fyri restina av heiminum.

Vit gleða okkum til at føra norðurlendska samstarvið víðari.

# Fororð hjá samstarvsráð-harrunum




Morten Dahlin, ráðharri fyri norðurlendskum samstarvi (Danmark) og Bjarni Kárason Petersen, ráðharri fyri norðurlendskum samstarvi (Føroyar)

**Myndir:** By-, Land- og Kirkeministeriet & Amy Hansen

Heimurin hevur tørv á fleiri norðurlendskum virðum – ikki færri. Tí Norðurlond hava nakað serligt at bjóða. Vit vilja brúka formansskapin til at samansjóða øll átta Norðurlond enn meira og seta kós móti visjónini hjá stjórnarleiðarunum: at Norðurlond skulu vera heimsins mest integreraða og burðardygga landaøki í 2030.

Tað fara vit at gera við at arbeiða við ítøkiligum politiskum økjum og við at leggja serligan dent á at styrkja fólksliga norðurlendska samstarvið í sivilsamfelagnum. Norðurlond eru fyrst og fremst fólkið, sum her býr.

Norðurlond eru sameind á nógvum økjum – við sínum máli, fólkaræði, samfelagsbygnaði, undirstøðukervi, ríka mentanararvi og sterka sivilsamfelag. Alt hetta kann koma undir trýst við tíðini, serliga av geopolitiskum spenningum. Eftir russisku innrásina í Ukraina gjørdi Norðurlendska ráðharraráðið av at fara undir eitt nýtt og týdningarmikið arbeiði fyri samfelagsligari trygd og tilbúgving í Norðurlondum. Tað fara vit at leggja serligan dent á undir hesum formansskapinum.

Vit fara eisini at leggja serligan dent á okkara fólkaræði, sum ikki kann takast fyri givið. Vit síggja, hvussu falstíðindi seta alsamt meiri dám á tað almenna kjakið og royna at bróta samanhaldið niður heldur enn at styrkja tað.

Kappingarførið í Norðurlondum er grundleggjandi sterkt, men má styrkjast enn meira. Ein støðugt vaksandi fyrisiting forðar feløgum og íverksetarum í at røkka sínum fulla potentiali. Tí hava vit sett í verk eina greining av norðurlendska kappingarførinum og fara at leggja hana fram undir hesum formansskapinum. Vit gleða okkum til at arbeiða við niðurstøðunum og til formansskapin sum heild.

Í Norðurlondum halda vit saman. Og sjáldan hevur samanhald havt so stóran týdning sum nú.





**Myndir:** Adam Mørk/Visit Denmark. Nicolai Perjesi/Copenhagen Capacity. Colin & Meg/Unsplash.

# Norðurlond: Heimsins mest burðardygga og integreraða landaøki í 2030

Norðurlendsku stjórnarleiðararnir samtyktu í 2019 ta visjón, at Norðurlond skulu vera heimsins mest burðardygga og integreraða landaøki í 2030. Visjónin byggir á tríggjar strategiskar raðfestingar, nevniliga eini **grøn, kappingarfør og sosialt burðardygg Norðurlond**. Hetta eru framsøkin og týðandi mál. Formansskapurin fer tí at leggja dent á, at nýggju samstarvs- og arbeiðsætlanirnar fyri 2025-2030 verða fylgd neyvt.

## Okkara visjón 2030

**Norðurlond skulu vera heimsins mest burðardygga og integreraða landaøki í 2030**

**Kappingarfør** Norðurlond
Saman vilja vit fremja grønan vøkstur í Norðurlondum, grundaðan á vitan, nýskapan, flytføri og talgilda integratión.

**Grøn** Norðurlond
Saman vilja vit fremja eitt grønt skifti í samfelagi okkara og arbeiða fyri CO2-javnvág og einum burðardyggum, lívgrundaðum ringbúskapi.

**Sosialt burðardygg** Norðurlond
Saman vilja vit fremja eitt fevnandi, javnsett og samanhangandi landaøki við felags virðum og styrktari mentanardeiling og vælferð.

# Vit skulu koma á mál til ásetta tíð

Norðurlendska ráðharraráðið legði í 2023 fram eina støðufrágreiðing um arbeiðið við Visjón 2030. Frágreiðingin vísir, at Norðurlond sum heild framvegis eru á veg til at gerast **heimsins mest burðardygga og integreraða landaøki**. Tað er serliga galdandi fyri visjónirnar um kappingarfør og sosialt burðardygg Norðurlond. Enn manglar nakað í fyri at røkka visjónini um grøn Norðurlond.

## Grøn Norðurlond

Frágreiðingin vísir, at vit á fleiri økjum hava ilt við at røkka visjónini um grøn Norðurlond – bæði nú og fram til 2030. Hóast tað yvirhøvur gongur rættan veg, so bendir nógv á, at tað gongur ov seint, um málsetningarnir í Visjón 2030 skulu haldast. Formansskapurin vil seta meiri ferð á arbeiðið fyri at kunna røkka visjónini um Norðurlond sum heimsins grønasta landaøki.

## Kappingarfør Norðurlond

Frágreiðingin vísir, at vit eru á rættari leið til at røkka visjónini um kappingarfør Norðurlond í 2030, bygt á **grønan vøkstur, nýskapan, flytføri og ringbúskap**. Heldur gongdin fram, fara Norðurlond at gerast enn kappingarførari í 2030. Sum heild er kappingarførið í ES tó undir trýsti. Í formansskapstíðini fokusera vit tí upp á, hvussu vit við okkara góðu fortreytum kunnu vera við til at styrkja enn meira um kappingarførið í Norðurlondum og í restini av Evropa.

## Sosialt burðardygg Norðurlond

Frágreiðingin vísir, at vit sum heild eru væl á veg at gerast eitt **sosialt burðardygt og javnsett landaøki**. Tað er eitt eyðkenni við norðurlendingum, at teir hava álit á hvør øðrum og góða heilsu, og arbeiðsloysi og kriminaliteti er lítið av í londunum. Tó er enn pláss fyri batum, serliga í mun til sjálvupplivdan trivnað. Tí er tað týdningarmikið fyri formansskapin at halda fram við at hava fokus á sosiala burðardygd og javnstøðu í Norðurlondum.

# Integratión av øllum Norðurlondum

Skulu vit kalla okkum heimsins mest integreraða landaøki í 2030, mugu **øll átta Norðurlond vera við**. Ikki bara í mun til politikk og markanevndir, men eisini í mun til parlamentariska samstarvið í Norðurlandaráðnum og stjórnarsamstarvið í Ráðharraráðnum. Vit eru eitt landaøki við átta londum – og verulig integratión krevur, at øll londini eru við.

## Dagføring av Helsingforssáttmálanum

Helsingforssáttmálin regulerar tað norðurlendska samstarvið og verður ofta kallaður tann norðurlendska grundlógin. Sáttmálin kom í gildi 1. juli 1962 og hevur síðan verið grundarlagið undir tí góða samstarvinum, sum er millum øll Norðurlond. Sáttmálin er dagførdur fleiri ferðir, seinast tann 2. januar 1996.

Dagføringarnar hava tryggjað, at sáttmálin hevur verið tillagaður leypandi, og tær hava soleiðis gjørt, at samstarvið millum londini hevur kunnað verið so gagnligt, sum til ber. Fyri formansskapin er tað sera týdningarmikið, at **tað norðurlendska samstarvið heldur áfram at vera viðkomandi** og so vælvirkandi, sum til ber, eisini í komandi tíðum – vit kunnu ikki loyva okkum annað. Politiska støðan í 1996 var øðrvísi enn nú, skjótt 30 ár seinni. Tað skal okkara samstarv kunna endurspegla og handfara.

Á ársfundinum hjá Norðurlandaráðnum í 2024 varð einmælt samtykt eitt tilmæli til norðurlendsku stjórnirnar um at dagføra Helsingforssáttmálan, so at tey sjálvstýrandi londini kunnu fáa **fullan limaskap í Norðurlandaráðnum og Norðurlendska ráðharraráðnum**, um tey ynskja tað, og um tað er í samsvari við teirra stýrisskipan. Samstarvsráðharrarnir samtyktu tann 4. apríl 2025 at útnevna ein løgfrøðiligan ráðgeva at kanna stjórnarrættarligar, ES-rættarligar og fólkarættarligar spurningar í hesum sambandi. Frágreiðingin verður liðug, meðan Finnland og Áland hava formansskapin í Norðurlendska ráðharraráðnum.

> Formansskapurin fer at fylgja við arbeiðinum við løgfrøðiligu frágreiðingini og dagføringini av Helsingforssáttmálanum, alt í samráði ráðharraráðið hjá samstarvsráðharrunum.

## Integrerað Norðurlond uttan markaforðingar

Ein treyt fyri at verða heimsins mest integreraða landaøki er, at markaforðingar millum øll átta Norðurlond verða burturtiknar, har tað ber til. Í 2024 varð samtykt at umskipa Markaforðingarráðið. Norðurlond hava nú eitt meira tíðarhóskandi og virkið ráð, sum kann vegleiða Ráðharraráðið um nýggj átøk og ábøtur fyri at beina burtur markaforðingar. Í 2026 hevur Markaforðingarráðið sitið helvtina av fýra ára skeiði sínum. Formansskapurin arbeiðir tí tætt saman við ráðnum fyri at gera eina miðvegismeting av arbeiðinum hjá ráðnum. Tað er sera **umráðandi** fyri formansskapin at tryggja, at arbeiðið at taka burtur markaforðingar riggar so væl sum gjørligt – til gagns fyri fólk og fyritøkur. Samstundis skulu Norðurlond kunna samstarva um at nýta amboð sum t.d. markaeftirlit í stríðnum móti skipaðum bandarelateraðum fleirlandakriminaliteti, sum er ein stórur og vaksandi trupulleiki í Norðurlondum, *sí partin Skipaður bandarelateraður kriminalitetur*. Tí Norðurlond skulu framhaldandi vera ein felags eind, har vit kunnu líta á hvønn annan.

Besti háttur at minka um markaforðingar er at lata vera við at seta tær upp. Norðurlond hava ymiskar mannagongdir til tess. Í Danmark og Føroyum er t.d. lógarásett, at nýggjar lógir skulu taka atlit til, um tær hava við sær nakrar norðurlendskar markaforðingar.







**Myndir:** Visit Faroe Islands. Daniel Rasmussen/Copenhagen Capacity. Johan Nilsson/Øresundsbron/Visit Denmark.

# Tvørgangandi fokusøkir í formansskapinum

Í formansskapstíðini hjá Norðurlendska ráðharraráðnum í 2026 er **tvørgangandi fokus á styrkta samfelagstrygd og á leiklutin hjá Norðurlondum í heiminum**.

## Styrkt samfelagstrygd

Formansskapurin hevur serligt fokus á at styrkja norðurlendsku samfelagstrygdina. Arbeiðið byggir á týdningarmiklu stigini, sum vórðu tikin undir formansskapinum hjá Finnlandi og Álandi í 2025, har samfelagstrygd og tilbúgving vóru fokusøkir.

Norðurlond skulu gerast **mótstøðuførari móti kreppum og hybridálopum**. Tað krevur, at øll átta Norðurlond verða tikin meira við í arbeiðið og gera sín part. Hetta fevnir bæði um mótstøðuføri og virkisføri og er galdandi á øllum málsøkjum. Ráðharraráðini hava tí undir formansskapinum serligt fokus á, hvussu teirra øki kann mennast, so at tað styrkir ta samlaðu breiðu samfelagstrygdina í Norðurlondum. Formansskapurin heldur eisini fram við tí góða samspæli, sum er millum arbeiðið hjá ráðharraráðunum og annað norðurlendskt arbeiði, sum gjørt verður til frama fyri samfelagstrygdina, sí mynd 1.

## Norðurlendskt samstarv um samfelagstrygd og tilbúgving fyri at gera Norðurlond mótstøðuførari móti kreppum og hybridum hóttanum.




**Mynd 1** Samfelagstrygd er ein tvørgangandi raðfesting í Norðurlendska ráðharraráðnum og skal lyftast av øllum ráðharraráðum innan fyri tær rammur, sum ES, NATO og HAGA seta í mun til trygdaráhugamálini hjá einstøku londunum.

### Styrkt veitingartrygd

Veitingartrygd er avgerandi fyri samfelagsberandi funktiónir og ein týðandi liður í arbeiðinum at styrkja um samfelagstrygdina. Raðfesting av veitingartrygdini fer undir danska og føroyska formansskapinum at hjálpa til við at **tryggja okkum atgongd til samfelagskritiskt tilfeingi**.

Formansskapurin vil byggja upp eitt sterkt norðurlendskt samstarv um veitingartrygd. Tað skal vera við til at skapa **sterk og tillagingarfør Norðurlond**, sum standa saman um at handfara komandi veitingarkreppur. Formansskapurin fer tí at **styrkja tað nýggja norðurlendska netverkið fyri veitingartrygd**. Netverkið fer millum annað at viðgera nýggj samstarvsøki, sum kunnu fremja veitingartrygdina í øllum Norðurlondum. Tað kann til dømis vera at deila vitan um analytiskar arbeiðshættir og mótstøðustrategiir, soleiðis at norðurlendskir myndugleikar fara at duga betur at handfara órógv í veitingarketum, ella vitan um atgongd til kritiskt tilfeingi og um at fyribyrgja og loysa veitingarkreppur.

Innsatsurin at styrkja norðurlendskt samstarv um veitingartrygd skal halda seg til átøk, sum skulu leggja afturat og ikki bara kopiera líknandi altjóða arbeiði.

Av tí at fleiri myndugleikar og privatir aktørar skulu brúka av sama tilfeingi, kann tað – út frá einari ítøkiliga meting frá ábyrgdarhavandi myndugleikum – vera bæði gagn og trygd í at samstarva um at útvega kritiskt tilfeingi, tá ið skilagott er at gera tað. Til dømis við felags innkeypi, felags goymslum og møguleikum at leiga og læna frá hvørjum øðrum.

At vera við til at gera norðurlendskt vinnulív meira mótstøðuført, gevur eisini meining í sambandi við yvirlýsingina hjá norðurlendsku vinnumálaráðharrunum um ein felags norðurlendskan vinnufelagsskap í mun til málini í Visjón 2030 um kappingarfør Norðurlond.

### Heilivágsresistensur og heilivágssamstarv

Tørvur er á einum styrktum norðurlendskum innsatsi fyri at tryggja, at **vit kunnu handfara heilsuhóttanir** – bæði nú og í framtíðini. Tann vaksandi heilivágsresistensurin krevur handling. Antibiotika hevur bjargað óteljandi lívum, men alt fleiri bakteriur gerast mótstøðuførar. Tørvur er á at deila vitan og royndir í mun til heilivágsresistens um øll Norðurlond. Altjóða verður arbeitt alt meira upp á tvørs av sektorum fyri at skapa betri úrslit, og øll heilsa verður tikin við – fólkaheilsa, djóraheilsa, plantuheilsa og umhvørvisheilsa. Norðurlond eiga eisini at fara meira hesa leið. Formansskapurin arbeiðir harumframt fyri, at Norðurlond við felags innkeypi kunnu tryggja sær atgongd til antibiotika.

### Tilbúgvingarætlanir í mun til útsettar borgarar

Formansskapurin fer – í regi av norðurlendska samstarvinum á sosial- og eldraøkinum – undir verkætlan, ið skal stuðla undir vitanardeiling um góðar mátar at **taka hædd fyri tørvinum hjá útsettum borgarum í tilbúgvingarætlanum**. Verkætlanin skal millum annað kortleggja tilbúgvingararbeiðið í Norðurlondum, har serligur dentur skal leggjast á tann tørv, sum gomul fólk, fólk við breki og fólk, ið eru sosialt útsett, kunnu hava – ella fáa, tá ein kreppa stingur seg upp. Úrslitini frá verkætlanini verða ætlandi løgd fram síðst í 2026.

## Sterk Norðurlond í heiminum

Norðurlond skulu standa enn sterkari í heiminum. Í skiftandi tíðum er tað avgerandi, at vit **samstarva tætt við okkara sameindu og styrkja enn meira um bondini til grannalondini**.

### Arktis

Arktis er ein stórur partur av Norðurlondum. Norðurlendska arktisætlanin hevur síðan 1996 skapt góð úrslit fyri økið – við fokus á umhvørvi og veðurlag, sosialar umstøður, búskaparmenning og samstarvspartnarar. Í 2026 hevur ætlanin **30**

**ára jubileum**, og hetta verður markerað í alt 2026 við átøkum, ið leggja dent á tey norðurlendsku úrslit, sum skapt eru í Arktis gjøgnum øll hesi ár. Høvuðsfokus hjá arktisætlanini er mótstøðuføri og sterk sivilsamfeløg í Arktis. Hetta verður framt við norðurlendskum samstarvi og felagsskapum í Arktis.

Altjóða samstarvið í Arktis er ávirkað av vaksandi geopolitiskum spenningum – eisini í Norðurlondum. Tað skapar stórar avbjóðingar í mun til altjóða rættarskipanina og tað multilaterala samstarvið. Málsetningurin um frið og støðufesti í Arktis er tískil undir øktum trýsti. Norðurlond skulu tí halda fram at arbeiða fyri støðufesti og burðardyggum vøkstri í økinum. Í dag snýr burðardygd seg eisini um at standa ímóti teimum globalu spenningum og broytingum, sum vit eru í.

Arktisætlanin 2025–2027 hevur fokus á eitt sosialt mótstøðuført Arktis, eitt búskaparliga mótstøðuført Arktis og eitt veðurlags- og umhvørvisliga mótstøðuført Arktis. Hesar raðfestingar byggja á Visjón 2030 hjá Norðurlendska ráðharraráðnum um at skapa grøn, kappingarfør og sosialt burðardygg Norðurlond. Tí hevur norðurlendska samstarvið í Arktis nettupp fokus á at menna sosial og lívfør lokalsamfeløg, at stuðla staðbundnum vinnumøguleikum og burðardyggum búskapi og at fremja grøna umlegging í Arktis. Formansskapurin fer at arbeiða miðvíst fyri at skapa synergi við formansskapin hjá danska ríkinum í Arktiska ráðnum.

## Grannarnir fyri vestan

Ein týðandi málsetningur hjá Norðurlendska ráðharraráðnum er at vera við til at byggja upp kontaktir og netverk, flytførisvøkstur og vitanardeiling, gransking og mentan millum Norðurlond og grannarnar fyri vestan – USA, Kanada, Bretland og Írland. Formansskapurin fer serliga at leggja dent á hesi trý átøk:

- **Styrkja hugskots- og vitanardeiling** við øktum samstarvi millum Norðurlond og samstarvspartar í USA, Kanada, Bretlandi og Írlandi – við serligum denti á at nýmenna loysnir upp á felags avbjóðingar.
- **Styrkja norð til norð-samstarvið** millum Arktis í Norðurlondum og Arktis í Norðuramerika – við denti á størri flytføri, netverk og útveksling millum ung, granskarar og sivilsamfeløg í øllum økinum.
- **Virka fyri at seta á stovn eina umboðan í Kanada** – annaðhvørt talgilt ella við at útnevna ein skrivstovustjóra – fyri at styrkja samstarvið við grannarnar í vestri.

## Baltalond

Baltalond og Norðurlond hava nógv til felags – eitt nú fólkaræði, mannarættindi og virðing fyri lóg og rættarskipan – og samstarvið teirra millum verður støðugt styrkt. Fólkafrøðiligar broytingar og vaksandi, fløktir samfelagstørvir seta nýggj krøv til vælferðarskipanirnar í bæði Norðurlondum og Baltalondum. Samstundis eru stórir møguleikar í einum samstarvi um at **styrkja mótstøðuførið, nýskapanina og burðardygdina hjá báðum landaøkjum**. Virðið av samstarvinum

sæst longu í dag – eitt nú í norðurlendska-baltiska netverkinum móti arbeiðsmarknaðarbrotum, sum er eitt fleirlandasamstarv, ið arbeiðir fyri at basa kappingaravlagandi virksemi og misnýtslu av arbeiðsmegi. Samstarvið hjá Norðurlendska ráðharraráðnum við Estland, Lettland og Litava – og við sivilsamfeløg í Ukraina og andstøðubólkar í Hvítarusslandi – verður styrkt, orsakað av globalu trygdarstøðuni og spenningunum í Eystrasalti. Baltalond eru eisini boðin við sum ein integreraður partur av arbeiðinum í Norðurlendska ráðharraráðnum fyri talgilding (MR-DIGITAL), har tey luttaka í bæði politiskum og praktiskum samstarvi um felags møguleikar og avbjóðingar á talgilda økinum. Formansskapurin samstarvar eisini við Baltalond í Norðurlendska ráðharraráðnum fyri mentan (MR-KULTUR), m.a. um at styrkja tilbúgvingarætlanir á mentanarøkinum. Somuleiðis verður arbeitt fyri at **styrkja javnbjóðis partnaraskapir við Baltalond** og at bjóða teimum við í fleiri ráðharrabólkar.

## ES

Norðurlond eru framsøkin á mongum økjum og skulu standa sum **ein sterkur aktørur í Evropa**. Hetta er serliga galdandi, tá ið tað snýr seg um talgilding og grøna umlegging, sum millum annað styrkja kappingarføri og burðardygd okkara. Formansskapurin byggir víðari á royndir og átøk Danmarkar, meðan tað hevði formansskapin í ES á heysti 2025. Serliga leggur formansskapurin dent á eitt grønt, kappingarført og trygt Evropa.





**Myndir:** Andy Arbeit/Unsplash. NordGen/Norden.org. Ian Taylor/Unsplash.

# Grøn Norðurlond

Ein av størstu avbjóðingunum í okkara tíð eru **veðurlagsbroytingar, hóttar vistskipanir og minkandi lívfrøðiligt margfeldi**. Tí er tað avgerandi, at vit finna góðar og effektivar loysnir, sum kunnu framtíðartryggja grøn og burðardygg Norðurlond. Tað skal millum annað gerast við at stimbra nýggja grøna tøkni, staðbundna rótfesting av grønu umleggingini, rættar búskaparligar tileggjanir, burðardygga bygging og grøna umlegging av landbúnaðar- og matvørugeiranum. Norðurlond mugu ganga á odda við eini nýmennandi og kappingarførari grønari umlegging.

Nýtsla av varandi orku í Norðurlondum og ES (2004-2023)




**Mynd 2** Myndin vísir, hvussu stórur partur av samlaðu orkunýtsluni í Norðurlondum og ES kemur frá varandi orkukeldum. Konverteringstap í t.d. ravmagnsframleiðslu og fjarhita er ikki íroknað. Áland er ikki við í myndini orsakað av manglandi dátum.

**Kelda:** Nordregio og Nordic Statistics Database (ENER08). Umframt dátur frá Umhvørvisstovuni í Føroyum.

# Ein búskaparliga burðardygg grøn umlegging

Norðurlond eru samd um, at veðurlagsátøk eru neyðug, og vilja samstarva um at røkka málunum í Paríssáttmálanum. Samstundis er tað týdningarmikið, at grøna umleggingin er so kostnaðareffektiv sum gjørligt. Vit skulu fáa so nógv grønt sum møguligt fyri pengarnar. Umleggingin skal vera so landafrøðiliga avbalanserað, sum til ber, og skal vera við til at skapa eina felags samfelagsmenning. Í einum tíðarskeiði, har altjóða viljin til grøna umlegging er skiftandi, skulu Norðurlond ganga á odda og vísa, at grøn umlegging ikki bara er ein neyðug íløga í framtíðina hjá jørðini og komandi ættarliðum – men eisini **ein búskaparliga burðardygg íløga**, sum styrkir fólkaheilsuna. Í øllum Norðurlondum kann kostnaðareffektiviteturin betrast við at deila vitan, integrera veðurlagsatlit í makrobúskaparligar skipanir og við at samstarva um búskaparpolitikkir, sum tryggja grøna umlegging. Grøn umlegging av vinnugreinum, sum dálka illa, hevur týðiliga synergi upp á arbeiðið fyri reinari luft og mótstøðuførari náttúru.

Við avtaluni "Implementering af et Grønt Danmark" er Danmark fyrsta land í heiminum, sum setir CO2-gjald á landbúnaðin. Samstundis er avsett ein milliardaupphædd til at leggja stór øki um til skóg og náttúru – fyri at minka um veðurlagsávirkanina og fyri at skapa iltríkari vøtn og áir. Avtalan er eitt dømi um ítøkiligt átak í grønu umleggingini, sum hevur breiðan politiskan stuðul. Formansskapurin setir við útgangsstøði í donsku royndunum fokus á norðurlendskt samstarv fyri at tryggja so góða og burðardygga grøna umlegging sum gjørligt – samstundis sum tann sosiala javnvágin í samfeløgunum verður varðveitt. Eitt dømi um øki, har grøn umlegging ikki kann gerast uttan samstarv, er íverksetingin av grønum ferjuleiðum í samsvari við ráðharrayvirlýsingina frá 2022 um grønan ferjuflutning í Norðurlondum áðrenn 2030. Samsvarandi er gjørd avtala um nýggja kós fyri donsku fiskivinnuna, har stílað verður eftir einari grønari umlegging við tí endamáli at fáa eitt reinari og betri hav.

Verandi grøna umlegging og veðurlagstillaging broytir bæði bý, lendi og hvussu vit arbeiða og liva. Formansskapurin vil tí seta fokus á, hvussu umleggingin kann gerast **ein fyrimunur fyri lokalsamfeløg og útjaðaraøki**. Tað er avgerandi fyri eina væleydnaða grøna umlegging, at bæði veðurlagstillagingar og íløgur í eitt nú varandi orku eisini geva lokalum økjum møguleikar – ikki bara avmarkingar. Tað sama er galdandi, tá ið tað snýr seg um grøna umlegging í siðbundnari ídnaðarvinnu og primérvinnu, eitt nú í fiskivinnu, landbúnaði og skógrøkt.

Formansskapurin vil eisini varpa ljós á, hvussu vit búgva og byggja, og hvussu hetta kann gerast ein virkin partur av grønu umleggingini. Tí verður formansskapurin vertur fyri **einum norðurlendskum ráðharrafundi um bústaðar- og byggimál**, har viðgjørdir skulu verða møguleikarnir at fremja ta grønu, ringbúskaparligu og talgildu umstillingina av norðurlendskari bygging.

# Nýggj tøkni skal seta ferð á grønu umleggingina

Ferðin á grønu umleggingini má økjast, um Norðurlond skulu røkka málinum at vera heimsins burðardyggasta landaøki í 2030. Nýggj og kend tøkni kann longu vera við til at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum. Tí skulu skapast góðir og hóskandi karmar til at víðarimenna hesa tøkni, eitt nú til at brúka brint og til at innsavna og goyma CO2 (CCS).

## Brint

Norðurlond eru longu komin langt við grønu umleggingini og eru í mongum ein fyrimynd fyri restina av heiminum. Eitt av teimum næstu stigunum er at **tryggja grønt brennievni til vinnugreinar og fyritøkur, har tað ikki er einfalt at leggja um til eina veðurlagsneutrala framtíð**. Hetta er serliga viðkomandi fyri flogferðslu og skipaferðslu og tann partin av orkukrevjandi ídnaðinum, sum ikki kann elektrifiserast beinleiðis. Grønt brint og annað elframleitt brennievni kann vera við til at útfasa fossila orku og skifta hana út við varandi orku í staðin.

Serliga í flutningsvinnuni kann atgongd til CO2 fáa stóran týdning. Tí er umráðandi at hava eina væl grundaða støðu til, hvussu innsavnað CO2 kann nýtast best. Skulu vit náa okkara grønu málum, mugu norðurlendskar fyritøkur hava atgongd til brint í sínari umlegging.

Í eini orkuskipan, sum í vaksandi mun byggir á varandi orku, kann elgrundað brennievnisframleiðsla eisini skapa eina smidligari orkunýtslu, við tað at framleiðslan kann lagast til elútboðið – tíma fyri tíma.

Marknaðurin fyri brinti og øðrum elframleiddum brennievni er framvegis í menning, og eftirspurningurin fer væntandi at vaksa – ikki bara í Norðurlondum, men í øllum Evropa. Møguleikarnir eru tí stórir. Formansskapurin leggur serligan dent á at **betra um karmarnar fyri brinti og øðrum elframleiddum brennievni**, so at møguleikarnir kunnu gagnnýtast.

## CCS

Innsavning og goymsla av CO2 (CCS) er eitt týdningarmikið amboð til at **røkka veðurlagsmálunum** – bæði globalt við Paríssáttmálanum, í Evropa við málunum hjá ES, og í Norðurlondum við Visjón 2030. CCS kann í verki minka um útlátið frá til dømis brennistøðum, orkuverkum og tungídnaði. Harumframt ber til at fáa negativt útlát, um CO2 verður innsavnað og goymt, til dømis frá biogassverkum og lívrunnum keldum í veitingarsektorinum. Við hesum kann CCS eisini vera við til at fremja málini um veðurlagsneutrala framtíð og 110 % minking í útláti.

Norðurlond eru longu komin langt í at menna karmarnar fyri CCS og hava við tøkni síni møguleikan at ganga á odda og **slóða fyri einari kappingarførari grønari umlegging** komandi árini. Svøríki hevur millum størstu mongd av lívrunnum CO2 í Evropa, og í Danmark er politiskur meiriluti fyri at gagnnýta møguleikan at kunna goyma hana í teirri donsku undirgrundini, tí hon kann

goyma nógv meiri $CO_2$, enn landið sjálvt hevur tørv á. CCS-samstarvið í Norðurlondum veksur. Fyritøkan Ørsted arbeiðir við at seta í gongd fyrsta fullfíggjaða CCS-anlegg í Danmark, og her fer norska $CO_2$-goymslan Northern Lights at verða brúkt sum móttakari. Full ferð verður sett á anleggið í 2026.

Eftir áheitan frá Danmark er farið undir eina trý ára verkætlan um CCS í Norðurlendska ráðharraráðnum. Endamálið við henni er at styrkja samstarvið millum londini og harvið fremja eina skjótari útbreiðslu av allari virðisketuni innan CCS. Danmark og Svøríki lata lutfalsliga nógvan almennan stuðul fyri at fáa virðisketuna setta í verk. Formansskapurin leggur í hesum sambandi serligan dent á millumlandaflutning og undirstøðukervið, sum eru fortreytir fyri, at CCS kann virka í praksis.

## Burðardygg og mótstøðufør matvøruvinna, landbúnaðarvinna og fiskivinna

Norðurlond skulu ganga á odda í at tryggja heilsugóðar og burðardyggar matvørur og í at fremja eina grøna umlegging av landbúnaðarvinnuni og fiskivinnuni. Hetta gerst bara, um vit hugsa loysnirnar saman og hava allar partar av umleggingini við í myndini. Øll mugu við. Heimsstøðan hevur staðfest, hvussu umráðandi tað er at hava eina mótstøðuføra matvøruveiting, bæði í einstøku londunum og í Norðurlondum sum landaøki. Her kunnu landbúnaðarvinnan, fiskivinnan og alivinnan spæla ein týðandi leiklut.

### Mótstøðuførar matvøruskipanir

Matvøruvinnan, landbúnaðarvinnan og skógarvinnan í Norðurlondum er avgerandi fyri veitingartilbúgving okkara. Stór stig eru longu tikin til at fáa mótstøðuførari matvøruskipanir – seinast við Karlstadyvirlýsingini um tilbúgving og mótstøðuføri (2024). Í formansskapstíðini verður arbeitt víðari við niðurstøðunum frá ráðharraráðsfundinum í Kuopio (juni 2025), og sett verða í verk tiltøk, sum kunnu styrkja norðurlendska samstarvið og vitanardeilingina til tess at fáa mótstøðuførari Norðurlond við eini **treystari og sterkari tilbúgving á matvøru- og landbúnaðarøkinum**.

Virksemið hjá NordGen er ein heilt avgerandi partur av undirstøðukervinum, tá ið ræður um varðveitslu av ílegutilfeinginum hjá landbúnaðarvinnuni. Tað er støðið undir teirri gransking og foredling, sum skal til fyri at kunna hava eina trygga matvøru- og fóðurveiting og fyri at kunna lúka krøvini um veðurlag og umhvørvi. Formansskapurin fer at arbeiða fyri at verja arbeiðið hjá NordGen.

### Ættarliðsskifti

Tørvur er á fleiri ungum í landbúnaðarvinnuni, matvøruvinnuni, fiskivinnuni, alivinnuni og skógarvinnuni – við øðrum orðum: í øllum geiranum undir MR-FJLS. Vinnurnar hava stórar avbjóðingar við at finna arbeiðsfólk, og miðalaldurin á starvsfólkinum heldur áfram at vaksa. Ein orsøk til støðuna er, at hesar vinnur hava trupult við at kappast við aðrar vinnur um løn og arbeiðsumstøður.

Í 2023 setti Norðurlendska ráðharraráðið í gongd eina visjónsverkætlan til at **styrkja leiklutin hjá ungum í norðurlendsku matvøruskipanunum** og til at skapa størri fjølbroytni í vinnunum. Arbeiðið er grundfest í granskingarstovninum hjá Norðurlendska ráðharraráðnum, Nordregio.

Formansskapurin fylgir upp upp á visjónsverkætlanina og setir í verk møgulig nýggj initiativ. Endaliga visjónin verður løgd fram, og kjarnuátøk verða sett í verk.

## Burðardyggar matvøruskipanir

Tað er týdningarmikið, at Norðurlond ganga á odda í samstarvi um tryggan, heilsugóðan og burðardyggan kost – bæði av sjógvi og landi – og arbeiða saman um at minka matoyðsl. **Dentur verður lagdur á burðardygd og mótstøðuføri í matvøruskipanunum**, herímillum á virðisskapan og kappingarføri í vinnunum.

Norðurlond hava eina sterka matmentan og hava seinastu 20 árini bygt upp eitt sterkt brand við Ny Nordisk Mad og Norðurlendska køksmanifestinum. Formansskapurin fer at virka fyri at breiða Ny Nordisk Mad longur út og gera hann til gerandiskost í øllum Norðurlondum. Samstundis verða viðgjørdir møguleikarnir hjá Ny Nordisk Mad-rørsluni at savna Norðurlond um menningina av heilsugóðum, lønandi og mótstøðuførum matvøruskipanum.

Formansskapurin fer at seta í verk eina greining av, hvussu rávørur og matvørur úr sjónum kunnu styrkja um fólkaheilsuna og geva betri veitingartrygd. Greiningin skal eisini geva eina djypri fatan av týdninginum av nærleika og tilbúgving. Hetta kann geva Norðurlondum kappingarfyrimunir, samstundis sum fyrilit verða havt fyri umhvørvi og veðurlagi.

# Burðardygg fiskivinna

Havið er undir trýsti frá ymiskum mannavirksemi, og tí er tað týdningarmikið at vera tilvitað um, hvussu vit ávirka náttúruna, sum vit brúka. Norðurlond eiga at fremja ein fiskiskap, sum tekur størri atlit til havumhvørvið og tryggjar burðardyggar fiskastovnar. Hetta skal gerast við einari **vistfrøðiligari tilgongd**, har javnvág er millum havnýtslu og havvernd.

Tørvur er á eini heildarhugsan í umsitingini av norðurlendsku havøkjunum – eini tilgongd, sum bæði tekur støði í framtíðar møguleikum og loysnum, og sum tryggjar, at havøkini verða nýtt og umsitin á stovns-, umhvørvis-, samfelags- og búskaparliga burðardyggan hátt. Formansskapurin leggur tí serligan dent á grøna umlegging av fiskivinnuni og eina vistfrøðiliga tilgongd í umsitingini.

Trýstið á havumhvørvið skal minka við eini heildarætlan fyri, hvussu vit skipa og brúka havøkini. Hetta krevur javnvág millum fiskiskap, alivinnu, náttúruvernd og nýggja havgrundaða infrakervið, eitt nú vindorku – við serligum atliti at botnfiski sum toski.

Formansskapurin skipar fyri eini norðurlendskari ráðstevnu í Føroyum um botnfisk, har dentur verður lagdur á stovnsuppbygging og samspæl millum fiskiskap, umsiting, veðurlag og vistskipan.

Umsitingin av fiskivinnuni er partur av eini samlaðari umsiting av havinum og av strukturunum og funktiónunum í vistskipanunum. Umsitingin av fiskastovnum eigur at hava fokus á at tryggja burðardyggar stovnar við eini vistfrøðiligari tilgongd, so nýtslan av fiskatilfeinginum í framtíðini verður búskaparliga og umhvørvisliga burðardygg.

## Vistskipanargrundað havumsiting og havsamstarv

Norðurlendska havætlanin hevur til endamáls at **greiða tríføldu heimskreppuna** – dálking, veðurlagsbroyting og lívfrøðiligt margfeldistap – við at styrkja norðurlendska samstarvið um burðardygga havumsiting og samstarvið millum ymiskt virksemi á havinum. Ætlanin byggir á fleiri norðurlendskar politiskar yvirlýsingar – millum annað ráðharrayvirlýsingar um hav, veðurlag og lívfrøðiligt margfeldi, og stjórnarleiðarayvirlýsingina um burðardyggan havbúskap og grøna umlegging. Hesar yvirlýsingar eru politiska grundarlagið undir einum samskipaðum og framsøknum innsatsi á økinum.

Samstundis hevur ætlanin til endamáls at styrkja sambandið við tær raðfestingar, sum Danmark hevur sett sær í Arktis undir arktiska formansskapinum. Serligur dentur verður lagdur á vernd av sermerktum økjum, menning av amboðum til maritima økisplanlegging og á handfaring av óljóði og dálking í arktiskum havøki. Við einari samanhangandi tilgongd til havumsiting vil ætlanin fremja synergiir millum umhvørvisvernd, búskaparliga menning og veðurlagsfyrilit, við serligum atliti at viðkvomum arktiskum vistskipanum.

Formansskapurin fer at hava eina størri norðurlendska verkstovu í Keypmannahavn, har dentur verður lagdur á vard havøki (MPA og OECM) og á sambandið millum hav og veðurlag, herímillum havsúrgan, havhiti, kolevnisbinding og klimarefugiir.

Verkstovan fer eisini at hava fokus á felags, vistfrøðiliga grundaða havumsiting – herímillum sameksistens millum til dømis umhvørvisvernd, fiskiskap og vindmyllubrúk. Eisini fer at verða arbeitt við at gera eina støðufrágreiðing um arbeiðið við visjónsverkætlanunum Samskag og NorScen.





**Myndir:** Niels Bohr Instituttet. Visit Faroe Islands. Kim Wyon/Visit Denmark

# Kappingarfør Norðurlond

Globalt búskaparligt mótstøðuføri og kappingarføri hjá Norðurlondum er avgerandi fyri at tryggja framhaldandi vælstand og fíggjarorku til at kunna møta tí vaksandi eftirspurninginum eftir vælferðartænastum í samfeløgum okkara. Norðurlendskar fyritøkur standa seg sum heild væl í globalu kappingini, men tær mugu halda fram at menna seg og nýhugsa fyri at varðveita sína sterku støðu á heimsmarknaðinum. Tað krevur breiðan innsats at tryggja kappingarfør Norðurlond. Londini eiga at varðveita og styrkja samstarvið um at skapa góðar karmar fyri fyritøkur til tess at kunna **økja um útflutning og produktivitet**. Talgilda umleggingin skal eisini halda fram bæði í Norðurlondum og Baltalondum, so at landaøkið framvegis er tann talgildi slóðarin í Evropa.

## Arbeiðsvirkni í Norðurlondum og ES (2005–2024)




**Mynd 3** Myndin vísir, hvussu stórur partur av fólki millum 20 og 64 ár hevur verið í arbeiði í Norðurlondum og ES.

**Kelda** Nordregio og Nordic Statistics Database (WORK02)

Formansskapurin vil styrkja kappingarførið hjá norðurlendskum fyritøkum við eitt nú at fremja samstarv og nýskapan tvørtur um landamørk. Samstundis heldur formansskapurin fram við týdningarmikla arbeiðinum at **menna og samansjóða ta talgildu umleggingina í Norðurlondum og Baltalondum**, so at fólk og fyritøkur uppliva færri talgildar forðingar.

Formansskapurin leggur dent á at hava **mótstøðuførar norðurlendskar búskapir**, tí tað er ein fortreyt fyri at hava fíggjarligt rásarúm til at gera íløgur í týdningarmiklar raðfestingar og framtíðarloysnir. Hetta fevnir eitt nú um menning av nýggjari tøkni, mótstøðuførar strategiskar virðisketur og loysnir, sum minka um veðurlagsbroytingar og verja lívfrøðiligt margfeldi. Raðfestingar, sum skulu tryggja Norðurlondum leiklutin sum burðardyggasta landaøki í heiminum. Ein mótstøðuførur búskapur er eisini ein fortreyt fyri at kunna varðveita dygdina í vælferðarsamfelagi okkara og stuðulin aftan fyri tað – og harvið til sosialt burðardygg Norðurlond. Tað krevur eitt framhaldandi nútímans heilsuverk, eina fevnandi útbúgvingarskipan og eina betri samanhangandi almenna tænastu í øllum Norðurlondum, til gagns fyri borgarar og vinnulív.

## Mótstøðuførir og kappingarførir norðurlendskir búskapir – í ES og í heimi

Tað krevur ein mótstøðuføran búskap fyri at kunna stýra í ótryggum og broytiligum umstøðum og samstundis verja felags norðurlendsk áhugamál. Ein mótstøðuførur búskapur er eisini ein fortreyt fyri at kunna møta tí átrokandi tørvinum á at styrkja verjuna. Tí hevur formansskapurin fokus á, at búskapirnir í Norðurlondum skulu vera bæði mótstøðuførir og kappingarførir – við sunnari og haldførari almennari fígging. Tað merkir millum annað, at dentur skal leggjast á búskaparligar reformar á arbeiðsmarknaðinum og á betri karmar fyri vinnulívið, herímillum at hava færri fyrisitingarligar byrðar við tí endamáli at fáa eitt produktivari vinnulív, sum eisini kann kappast á altjóða marknaðinum.

Formansskapurin vil eisini stuðla undir økt kappingarføri í Norðurlondum við at varpa ljós á felags avbjóðingar og finna loysnir, sum kunnu økja um vakstrarpotentialið í landaøkinum.

> Formansskapurin kortleggur tann lærdóm og tær royndir, sum Norðurlond fingu í orkukreppuni og í Covid-19. Endamálið er at standa sterkari í handfaringini av komandi búskaparligum stoytum.

### Norðurlendsk frágreiðing um kappingarføri

Frágreiðingin hjá Mario Draghi um støðuna og útlitini fyri kappingarførið hjá ES hevur varpað ljós á eina av teimum grundleggjandi avbjóðingunum hjá felagsskapinum, nevniliga vánaligu produktivitets- og kappingarevnini.

Norðurlond hava eina sterka støðu og góðar fortreytir fyri at ganga á odda í arbeiðinum fyri einum sterkari ES, samstundis sum dentur verður lagdur á grøn, talgild og sosialt burðardygg Norðurlond. Tí hevur formansskapurin, saman við sekretariatinum hjá Norðurlendska ráðharraráðnum, boðið út arbeiðið at gera **eina frágreiðing um kappingarførið hjá Norðurlondum**. Frágreiðingin skal geva vitan um kappingarførið, herímillum lýsa styrkir og menningarmøguleikar, sum kunnu stuðla undir Visjón 2030 um at gera Norðurlond til heimsins mest kappingarføra og grøna landaøki.

Formansskapurin og Norðurlendska ráðharraráðið skipa fyri árligu visjónsráðstevnuni á heysti 2026, har dentur verður lagdur á kappingarførið hjá Norðurlondum.

## Sjálvvirkandi burðardygdarfrágreiðing í Norðurlondum

Norðurlendskar fyritøkur skulu skjótt og trygt kunna **deila dátur** sínámillum, herímillum burðardygdardátur. Hetta fer at fremja vinnuliga burðardygd og grøna umlegging, integrera norðurlendska marknaðin enn meira og minka um fyrisitingarligar byrður hjá fyritøkunum. Ein slíkur lætti fer at gera sítt til at styrkja norðurlendska kappingarførið.

Formansskapurin arbeiðir fyri at fremja samstarv um sjálvvirkandi burðardygdarfrágreiðing í Norðurlondum.

## Nýtsla og menning av vitlíki til at styrkja kappingarførið

Formansskapurin vil seta fokus á, hvussu **vitlíki** kann nýtast til at styrkja kappingarførið hjá Norðurlondum og Baltalondum og effektivitetin hjá tí almenna. Ítøkiliga vilja vit skapa framtíðarinnar snildu og brúkaravinarligu talgildu loysnir umframt tryggar fyrisitingarligar lættar til norðurlendskar og baltiskar fyritøkur.

Formansskapurin fylgir upp upp á tilmælini frá eitt nú *Nordic Ethical AI Expert Group*.

### Tøkniligt ræði í Norðurlondum og Baltalondum

Geopolitiska støðan hevur víst, at Norðurlond og restin av Evropa hava tørv á at byggja upp sín egna kapasitet og at **minka um strategiska bundinskapin at einstøkum altjóða tøkniveitarum**. Tað snýr seg ikki um at avbyrgja seg, men um at tryggja verulig alternativ og skapa eina meira javnvigaða marknaðarstøðu, har okkara egnu loysnir fáa betri møguleika at kappast. Formansskapurin fer at taka evnið upp til politiska viðgerð av teimum strategisku møguleikunum og ítøkiligu stigunum, sum Norðurlond og Baltalond kunnu taka saman við ES.

### Tættari norðurlendskt-baltiskt samstarv um evropeiska virkisvangan

Seinastu árini hava Norðurlond og Baltalond, undir leiðslu av Norðurlendska ráðharraráðnum fyri talgilding (MR-DIGITAL), havt eitt tætt og væleydnað samstarv um at fremja ES-lóggávu um elektroniskar samleikar. Hetta samstarvið kann nú styrkjast enn meira. Komandi uppskotið frá Evropakommissiónini um ein talgildan evropeiskan virkisvanga kann fara at gera tað lættari at samskifta um landamørk – bæði millum fyritøkur sínámillum og millum fyritøkur og almennar myndugleikar. Tann **evropeiski virkisvangin** kann eisini fara at gera tað lættari hjá norðurlendskum og baltiskum fyritøkum at samstarva og gera samspælið við almennu myndugleikarnar smidligari. Hetta kann í síðsta enda eisini minka um fyrisitingarligu byrðurnar hjá vinnuni.

> Formansskapurin tekur saman um arbeiðið, sum higartil er gjørt við talgildum samleikum, og varpar ljós á møguleikan at styrkja enn meira um samstarvið um evropeiska virkisvangan.

## Eitt integrerað útbúgvingar- og granskingarøki

Eitt dugnaligt og væl útbúgvið fólk er grundarlagið undir einum haldførum búskapvøkstri og styrkir kappingarførið í eini tíð, sum setir stór krøv til evnini hjá fólki at tillaga seg.

Førleikarnir, sum krevjast í sambandi við grønu og talgildu umleggingina, eru eitt fokusøki hjá øllum Norðurlondum. Framtíðar útbúgvingar í Norðurlondum skulu tí avspegla tann førleikatørv, sum arbeiðsmarknaðurin og samfelagið hava. Integratiónin av útbúgvingargeiranum skal styrkjast. Samstundis skulu Norðurlond virka fyri sterkum felagsskapum og betri trivnaði hjá børnum, næmingum og lesandi á øllum útbúgvingarstigum.

## Eitt integrerað granskingarøki

Gransking og nýskapan eru lykilin til at loysa tær stóru felags samfelagsavbjóðingar og til at skapa innlendska og norðurlendska trygd. Formansskapurin raðfestir tí samstarv um grøna gransking og kritiska tøkni og um ábyrgdarfulla altjóðagerð og granskingartrygd.

Formansskapurin vil arbeiða fyri einari strategiskari norðurlendskari íløgu í **kvantatøkni**. Samstundis verður dentur lagdur á verandi leiðreglur um **granskingartrygd** og á verandi og komandi verkseting av teimum. Lykilin verður samstarv um betri vitanardeiling, felags granskingarverkætlanir, granskingarinfrakervi og uppbygging av kapasiteti og førleikum. Tað snýr seg um, hvussu vit styrkja granskingarsamstarvið í Norðurlondum sum best, og hvussu vit positionera okkum sum eitt granskingarøki í einum heimi, sum er merktur av geopolitiskari órógv og harðari altjóða kapping um tøkniliga menning. Ljós verður eisini sett á sambandið millum gransking, nýskapan og kappingarføri.






**Myndir:** Agaton Strom/Norden.org. Mathias Engmark/Roskilde Festival/Visit Denmark. Ricky John Molloy/Norden.org

# Sosialt burðardygg Norðurlond

Norðurlendsku vælferðarsamfeløgini byggja nógv á álit, men fleiri rák í samfelagnum seta nú bæði vælferðarskipanina og tað sosiala samanhaldið undir trýst. Vit skulu arbeiða fyri, at Norðurlond framhaldandi eru sosialt burðardygg og mótstøðufør. Formansskapurin hevur tí fokus á, hvussu vit kunnu menna og styrkja tey tilboð, sum viðvirka til, at fleiri fólk kunnu liva sjálvstøðugt og taka virknan lut í samfelagnum. Hetta fevnir um øll, eisini eldri, sum hava tørv á umsorgan og røkt. Eitt mótstøðuført vælferðarsamfelag er eisini eitt samfelag, har vit skapa vælferðina í tøttum samanspæli við felagsskapir og sivilsamfeløg á staðnum. Tað merkir eisini, at vit skulu **arbeiða fyri einum virknum borgaraskapi**, so at øll – eisini tilflytarar – taka lut í felagsskapum og í fólkaræðisligum tilgongdum.

Sosial burðardygd merkir, at øll hava **somu møguleikar at liva eitt gott lív** og at njóta sama frælsi. Tað er eisini galdandi fyri gentur og kvinnur við tilflytarabakgrund, sum eru úti fyri sosialum tvingsli. Samstundis skulu vit øll verja náttúru og tilfeingi til komandi ættarlið – og tryggja, at samfelagið er mótstøðuført, tá ið tað verður sett undir trýst uttanífrá. Okkara fólkaræði og virðir sum javnrættur og javnstøða eru kjarnin í tí, ið eyðkennir norðurlendsku felagsskapirnar. Tað skulu vit verja.

Inntøkuójavni í Norðurlondum og ES (2005–2024)




**Mynd 4** Myndin vísir gongdina í gini-talinum í Norðurlondum og ES. Gini-talið sigur, hvussu ójavnt inntøkan er býtt í einum landi. 0 er fullur javni (øll í landinum hava somu inntøku), og 1 er fullur ójavni (ein persónur í landinum hevur alla inntøkuna).

**Kelda** Nordregio, Nordic Statistics Database (GINI01) og Statistics Iceland

## Sterk fólkaræði

Eitt **sterkt sosialt samanhald** er hornasteinurin undir tí norðurlendska vælferðarsamfelagnum, og tað skulu vit framhaldandi styrkja. Sosialt samanhald er við til at skapa eitt trygt og stuðlandi umhvørvi fyri einstaklingar og bólkar, og tað styrkir eisini mótstøðuførið hjá samfelagnum, tá ið á stendur. Men samanhaldið verður eisini avbjóðað, tá einstaklingar og bólkar ikki fylgja meginreglum í felagsskapinum. Hetta minkar um savningarmegina og álitið á rættarsamfelagið og ger felagsskapin minni mótstøðuføran í krepputíðum. Tí hevur formansskapurin serligt fokus á at basa fleirlandakriminaliteti – og at styrkja um fólkaræðið og álitið í Norðurlondum.

### Styrkt fólkaræði og álit

Formansskapurin leggur dent á týdningin av at styrkja tað **serstaka norðurlendska felagslívið**, sum er grundarlag undir tí týdningarmikla lokala fólkaræðinum í gerandisdegnum, har børn og ung sleppa at vera ein partur av fólkaræðinum og venja seg við at luttaka í tí. Hetta fer í stóran mun at vera við til at framtíðartryggja fólkaræðið og tað álitsgrundaða samfelagið.

Fyri at styrkja norðurlendsku sivilsamfeløgini hevur formansskapurin givið Norrøna Felagnum til uppgávu at skipa eina ráðstevnu um sivilsamfeløg saman við Dansk Ungdoms Fællesråd.

### Skipaður bandarelateraður kriminalitetur

Norðurlond hava á fleiri økjum avbjóðingar við skipaðum og bandarelateraðum kriminaliteti, sum í alt størri mun flytur seg um landamørk. Eitt tætt norðurlendskt samstarv hevur tí stóran týdning, um londini skulu kunna gera nakað við hesar avbjóðingar í framtíðini. Formansskapurin heldur fram við arbeiðinum at basa skipaðum bandarelateraðum fleirlandakriminaliteti. Heilt ítøkiliga vilja vit styrkja tað norðurlendska samstarvið ímóti **misnýtslu av talgildum tænastum í sambandi við skipaðan kriminalitet**, eitt nú rekruttering av børnum og ungum til brotsverk. Somuleiðis vilja vit styrkja felags norðurlendska innsatsin í mun til samstarvið við triðjalond, haðani kriminellir leiðarar stýra grovum kriminaliteti í Norðurlondum.

## Javnstøða fyri øll – í Norðurlondum og um allan heim

Javnstøða er ein fólkaræðisligur hornasteinur og eitt kjarnuvirði í Norðurlondum. Javnstøða millum kynini og javnrættindi fyri LGBT+ fólk eru avgerandi fyri møguleikarnar hjá tí einstaka at skapa sítt egna lív og fyri samfelagsmenningina. Skulu Norðurlond halda fram við at vera kappingarfør, mugu allir norðbúgvar vera við og hava somu møguleikar til at ávirka menningina av tí norðurlendska vælferðarsamfeløgunum.

**Norðurlond eru komin langt í arbeiðinum fyri javnstøðu, men vit eru ikki komin á mál enn**. Samstundis merkist eitt altjóða móttrýst móti bæði javnstøðu og LGBT+. Tí fer formansskapurin at arbeiða breitt fyri javnstøðu.

### Pushing for Progress

Í fleiri londum og á altjóða pallum sæst ein skipað og miðvís mótstøða móti javnstøðu hjá kvinnum og rættindum teirra til egið lív og likam, og sama mótstøða sæst móti javnrættindum hjá LGBT+fólki. Norðurlond hava samtykt fleiri ára programmið *Pushing for Progress* fyri at tryggja, at tey standa saman ímóti hesum trýsti og fyri at fremja javnstøðu.

Formansskapurin skipar fyri eini norðurlendskari markering av IDAHOT+ (altjóða degnum ímóti homofobi og transfobi) og einari ráðstevnu um javnstøðu og rættindini hjá kvinnum til egið lív og likam.

## Menn, maskulinitetur og javnstøða

Seinastu árini hevur Norðurlendska ráðharraráðið havt vaksandi fokus á menn og maskulinitet. Normar og væntanir í mun til kyn ávirka eisini lívskorini hjá monnum og dreingjum, teirra møguleikar og avbjóðingar.

> Formansskapurin arbeiðir við eini frágreiðing undir heitinum *State of Nordic Men 2026*, sum millum annað fer at kanna lívið hjá monnum á netinum og hugburðin til javnstøðu.

## Árvakni um harðskap í nærsambondum og viðgerð av harðskapsfremjarum

Kynsbundin harðskapur er brot á integritetin hjá tí einstaka og hevur álvarsamar avleiðingar fyri tann, ið hann rakar, fyri familjuna og onnur nærsambond og fyri samfelagið sum heild. At basa harðskapi er eitt raðfest innsatsøki í norðurlendska samstarvinum og í altjóða høpi.

> Formansskapurin leggur dent á at menna nýggjar hættir í tí fyribyrgjandi og árvakna innsatsinum í øllum Norðurlondum og í samstarvi við Baltalond.

## Kappingarføri og javnstøða

Javnstøða er týðandi fyri kappingarførið í Norðurlondum, tí hon er ein fortreyt fyri, at fólkið, sum her býr, frítt kann brúka sínar gávur og førleikar til gagns fyri menningina av norðurlendskum samfeløgum.

> Formansskapurin setir í verk eina kanning, sum skal lýsa sambandið millum javnstøðu og kappingarføri – eitt nú hvussu javnstøða kann skapa búskaparligan vøkstur.

# Børn og ung

Eitt gott barna- og ungdómslív er týðandi grundarlag undir sosialt burðardyggum Norðurlondum. Formansskapurin raðfestir framhaldandi norðurlendskan ungdóm, herímillum **ungdómsluttøku**. Vit skulu virka fyri kunnleikanum og ognarkensluni hjá ungdóminum fyri Norðurlondum. Vit hava við øðrum orðum brúk fyri at **tryggja okkum eldhugan fyri tí norðurlendska samanhaldinum í nýggja ættarliðnum**.

Barna- og ungdómslívið í Norðurlondum kann vera so ymiskt. Í stórbýnum er tað ikki tað sama sum á bygd, har ungdómsumstøðurnar eru avbjóðandi. Tí er umráðandi at arbeiða fyri at styrkja ungu ættarliðini í útjaðaraøkjum.

> Í formansskapstíðini eru Føroyar vertir fyri tiltakinum Generation North Atlantic, har ung úr øllum átta Norðurlondum hittast til verkstovur, framløgur og fyritøkuvitjanir – við tí endamáli at kveikja undir nýskapandi tilgongdir og økismenning.

## Trivnaður hjá børnum og ungum

Alt ov nógv børn og ung í Norðurlondum uppliva mistrivnað, standa uttan fyri týdningarmiklar felagsskapir og kenna vaksandi ótta fyri framtíðini. Góðar royndir við at hjálpa børnum og ungum til ein sunnan og tryggan uppvøkstur skulu útbreiðast í Norðurlondum.

**Skjót uppsporing og fyribyrging av mistrivnaði** eru altavgerandi fyri, at børn og ung fáa rætta hjálp til tíðina og ikki uppliva langtíðar mistrivnað. Formansskapurin vil samstundis styrkja um vitanardeilingina á sosiala økinum um arbeiðshættir, sum virka í praksis, við tí fyri eyga at skapa góðar uppvakstrarumstøður fyri børn og ung í øllum Norðurlondum.

> Formansskapurin skipar fyri einum norðurlendskum toppfundi um sálarliga heilsu. Hetta tiltakið varð fyrstu ferð hildið í 2015, tá Danmark, Føroyar og Grønland áttu formansskapin.

Formansskapurin leggur eisini dent á trivnaðin hjá børnum og ungum við at taka stig til átøk út frá tilmælunum hjá donsku trivnaðarnevndini frá 2025, sum miða eftir at náa út til børn og ung og aðrar viðkomandi partar á økinum.

Samstundis arbeiðir formansskapurin við at styrkja fólkaheilsuna í Norðurlondum, eitt nú við at seta fokus á fyribyrgjandi innsatsir til at minka um tubbaks- og nikotinnýtsluna hjá børnum og ungum.

## Skaðiligt innihald og vernd av børnum og ungum

Skaðiligt og ólógligt innihald á **talgildum pallum** er ein stór avbjóðing, serliga fyri børn og ung. Tað er ein vaksandi tørvur á at verja tey ímóti vanaelvandi algoritmum, óetiskum handilsmodellum og umfatandi dátuinnsavnan og profilering. Tí skal talgilda regluverkið hjá ES nú av álvara standa sína roynd hjá okkum. Formansskapurin setir hetta til politiska viðgerð og spyr, hvat vit kunnu gera afturat fyri at verja børn og ung. Eitt umrøðuevni er eisini, um Norðurlond – sum talgildur slóðari – kunnu viðvirka við góðum praksis og ítøkiligum loysnum. Hetta fevnir eisini um, hvussu ES-lóggáva og nýggj lóggáva á økinum verður útint, og hvussu restin av Evropa kann fáa íblástur frá okkara arbeiði. Formansskapurin viðger politiskt, hvat meira kann gerast fyri at verja okkara børn og ungdóm – herímillum um Norðurlond sum talgildur slóðari kann vera við til at skapa gott praksis og ítøkiligar loysnir. Hetta fevnir eisini um at inspirera restina av Evropa við mátanum, sum vit umsita lóggávuna á økinum.

## Børn og ung í eini talgildari tíð

Talgildingin hevur broytt lívið hjá børnum og ungum. Við nýggjari tøkni, sosialum miðlum, vitlíki og vaksandi tørvi á talgildum førleikum er tað neyðugt, at børn og ung læra at hugsa kritiskt um, hvussu tey brúka tøkni og duga at navigera í einum talgildum heimi. Tað er týdningarmikið, at vit verja børn og ung í Norðurlondum í eini talgildari tíð.

Formansskapurin fer eisini at seta fokus á **skíggjanýtsluna** hjá børnum og ungum – bæði á avleiðingarnar, sum vaksandi nýtslan kann hava við sær, og ikki minst á trygdina hjá børnum og ungum á netinum. Tað er umráðandi, at tøkniliga menningin er stuðlandi og fremjandi fyri trivnað og læring teirra.

# Burðardygt arbeiðslív

Vit skulu verja okkara serstaka norðurlendska arbeiðsmarknaðarmodell og sáttmálaskipan, sum tryggja, at vit hava eitt **trygt og sunt arbeiðsumhvørvi og rættvísa kapping á norðurlendsku arbeiðsmarknaðunum**. Modellið er eyðkent av tøttum samstarvi millum stjórnir, arbeiðsgevarar og løntakarar um at finna vælfungerandi loysnir, ið kunnu tryggja bæði kappingarføri og skipað viðurskifti fyri løntakarar. Samstundis liva vit í skiftandi tíðum, har norðurlendsku arbeiðsmarknaðirnir støðugt møta nýggjum avbjóðingum.

## Styrkt norðurlendskt arbeiðsmarknaðarmodell

Formansskapurin setir fokus á, hvussu vit **framtíðartryggja okkara norðurlendska arbeiðsmarknaðarmodell**, har partarnir hava stórt sjálvræði og leypandi samskifta um, hvussu modellið og undirtøkan fyri tí kunnu styrkjast. Hetta er serliga týdningarmikið í eini tíð, har vit uppliva broytingar í arbeiðsmegini. Hetta eru felags norðurlendskar avbjóðingar, har vit kunnu læra og fáa íblástur hvør av øðrum, so at vit standa betur fyrireikað til framtíðina.

### Styrkt norðurlendsk átøk ímóti arbeiðskriminaliteti

Formansskapurin heldur fram við norðurlendska samstarvinum um at **basa arbeiðskriminaliteti og sosialari dumping**. Skipaðar umstøður og rættvís kapping skulu vera grundarlagið undir norðurlendska arbeiðsmarknaðinum. Tað snýr seg um at tryggja frían og rættvísan flutning av arbeiðsmegi við skipaðum lønar- og setanarviðurskiftum – eisini fyri útlendska og útsenda arbeiðsmegi – og eina effektiva umsiting av reglunum.

Arbeiðskriminalitetur eru vorðin ein vaksandi og afturvendandi avbjóðing í Norðurlondum. Tí leggur formansskapurin dent á, at londini deila royndir og praksis á økinum fyri at minka um trupulleikan.

## Eitt trygt mentanar- og miðlaøki

### Mentanarlig dubbing í Norðurlondum

Tann geopolitisku støðan undirstrikar týdningin av **felags norðurlendsku mentanini**, sum er bundin saman av einum felagsskapi, ið byggir á álit, samanhald og fólkaræði. Formansskapurin vil varpa ljós á leiklutin, sum mentanin hevur í tí norðurlendska felagsskapinum, herímillum á mentanina sum vernd um savningarmegi, samleika og fólkaræðisligu virðir okkara.

Formansskapurin fer m.a. at kanna, hvussu Norðurlond kunnu verja og styðja teir stóru partar av mentanarlívinum, sum eru við til at vaksa um serstøku norðurlendsku menniskja- og samfelagsvirðini. Hetta fevnir millum annað um styrkta atgongd til mentan, vernd av materiellum og immateriellum mentanararvi, øktan lesihug millum børn og vaksin, stuðul til norðurlendskan málpolitikk o.a. Arbeiðið fer at fara fram í tøttum samstarvi við Baltalond, sum Norðurlond hava ein sterkan virðisfelagsskap saman við.

### Stuðul til mentanarvinnuna

Sum liður í mentanarligu dubbingini vil formansskapurin seta serligt fokus á mentanarvinnuna. Norðurlendska mentanarvinnan er ikki bert eitt dømi um nýskapan og vøkstur, men er eisini við til at skapa eitt sterkari og virðisríkari brand, sum stendur fyri fólkaræðisligum virðum og opinleika. Í eini tíð, har falstíðindi og polarisering breiða seg, gerast mentan og skapan eitt búskaparligt og strategiskt amboð, sum Norðurlond kunnu brúka í størri mun til at breiða út norðurlendsk virði.

Fyri at gagnnýta møguleikarnar í mentanarvinnuni er tørvur á at økja um samstarv okkara við einum miðvísum innsatsi fyri at gera norðurlendskar mentanaraktørar sjónligari, bæði í Norðurlondum og á altjóða pallum. Formansskapurin fer tí at kanna, hvussu Norðurlond kunnu arbeiða strategiskt fyri at **økja um mentanarútflutningin**, serliga í geopolitiskum høpi.

## Styrkt samstarv um public service-tilfar

Í sambandi við arbeiðið við mentanarvinnuni fer formansskapurin at hava serligt fokus á miðlar. Í Norðurlondum hava vit sterka siðvenju at skapa public service-tilfar, har endamálið ikki bara er vinningur og undirhald, men eisini kunning og mentanarligt dannilsi. Seinastu áratíggjuni hava útlendskar stroymingartænastur tó fingið eina markanta støðu bæði á norðurlendska og evropeiska marknaðinum. Í endanum av 2023 høvdu Netflix og HBO Max til samans 7,7 mió. haldarar í Danmark, Finnlandi, Noregi og Svøríki. Teirra ræði hóttir norðurlendsku mentanarfatanina, tí at staðbundnar søgur, mál og mentanarlig ávísingarpunkt eru í vanda fyri at tapa fyri útlendska tilfarinum.

Eitt **styrkt norðurlendskt samstarv um public service-tilfar** kann vera við til at tryggja málsligt fjølbroytni, lokala grundfesting og altjóða perspektiv í Norðurlondum og í øllum heiminum. Eitt land greiðir ikki trupulleikan einsamalt – hetta krevur samstarv og strategiska grundfesting í øllum Norðurlondum.

Formansskapurin viðger og setir í verk átøk, sum kunnu stuðla øktum innihaldi frá almennum tænastum í øllum Norðurlondum og í restini av heiminum. Arbeiðið verður grundað á arbeiðsbólkin, sum MR-K hevur samtykt at sett á stovn í formansskapstíðini hjá Finnlandi og Álandi.





**Myndir:** Smyril Line. Martin Thaulow/Norden.org. Ólavur Frederiksen.

# Vit arbeiða fyri at tryggja, at Norðurlond eru sameind í skiftandi tíðum

Henda ætlan lýsir raðfestingarnar og felags mál hjá formansskapinum fyri 2026. Vit leggja nógva orku í norðurlendskt samstarv og gleða okkum til at fáast meira við tað í formansskapinum.

Samstarvið í Norðurlendska ráðharraráðnum er virðismikið fyri fólkið í Norðurlondum og hevur við tíðini ment eitt øki í heimsklassa. Tað hevur skapt fyrimunir fyri fólkið, tí tað kann liva í tryggum og burðardyggum samfeløgum. Men tað hevur eisini verið ein søgulig menning í meira enn eina hálva øld. Norðurlond hava ikki staðið í stað, men hava ment seg og flutt seg. Bert við støðugari menning kunnu vit halda fast við tann norðurlendska kjarnan. Vit skulu halda áfram og støðugt tryggja okkum, at okkara samstarv er sum best, bæði í formi og innihaldi.

Sum heimurin broytist, er tað umráðandi, at Norðurlond áhaldandi og saman kunnu finna nýggjar burðardyggar loysnir upp á núverandi avbjóðingar og varpa ljós á norðurlendska sjónarmiðið á altjóða pallum.

**Norðurlond 2026: Sameind í skiftandi tíðum**

# Um hesa útgávu

## **Norðurlond 2026:** Sameind í skiftandi tíðum. Formansskapurin hjá Danmark og Føroyum í Norðurlendska Ráðharraráðnum 2026

PolitikNord 2025:724
ISBN 978-92-893-8349-3 (PDF)
ISBN 978-92-893-8350-9 (ONLINE)
http://dx.doi.org/10.6027/politiknord2025-724

© Norðurlendska ráðharraráðið 2025

Forsíðumynd: Polina Kuzovkova / Unsplash
Útgivin: Oktober 2025

## Norðurlendska ráðharraráðið

Norðurlendska ráðharraráðið er almenni samstarvsstovnurin hjá norðurlendsku stjórnunum. Samstarvið fevnir um Danmark, Finnland, Føroyar, Grønland, Ísland, Noreg, Svøríki og Áland.

Í 2019 settu norðurlendsku stjórnarleiðararnir fram eina felags visjón um, at Norðurlond skulu vera heimsins mest integreraða og burðardygga landaøki í 2030. Samstarvið í Norðurlendska ráðharraráðnum skal stuðla hesum endamáli gjøgnum arbeiðið fyri grøn, kappingarfør og sosialt burðardygg Norðurlond.

Norðurlendska ráðharraráðið
Nordens Hus
Ved Stranden 18
1061 Keypmannahavn
www.norden.org

Les aðrar norðurlendskar útgávur: www.norden.org/publications